HOYVÍKAR SKÚLI

Skúlastýrisfundur

Hósdagur, 24. august 2017 kl. 16:30

Á fundinum vóru: Jeanette Blaasvær, Malan Mikkelsen, Petur Mittún, Bjørghild Djurhuus, Bogi Andreasen, Manne Persson og Leivur Simonsen

Skrivari: Hans Jón Thomsen

Skrá

Leivur Simonsen er nývalt starvsfólkaumboð í skúlastýrinum. Leivur Simonsen avloysir Manna Persson.

Jeanette Blaasvær greiðir frá um ymisk mál, sum vóru umrødd síðsta skúlaár og sum skulu arbeiðast víðari við og mál, sum skulu takast upp komandi.

Hoyvíkar skúli 40 ár:

Leiðslan greiðir frá, at Hoyvíkar skúli fyllir 40 ár í september í ár. Stemningur er í skúlastýrinum fyri, at føðingardagurin skal haldast. Umrøtt verður, hvussu føðingardagurin verður skipaður.

Spurningurin um, hvat hetta kemur at kosta og hvør skal rinda fyri ein eventuellan føðingardag stingur seg upp.

Leiðslan greiðir frá, at rúmd ikki er fyri hesum í játtanini hjá skúlanum, og tí er tað ikki tikið hædd fyri hesum í fíggjarætlanini fyri 2017. Leiðslan heldur, at Tórshavnar kommuna má traðka til, um tiltakið kemur at kosta nógv og heldur, at tað er ein sjálvfylgja, at kommunan er við til at hátíðarhalda Hoyvíkar skúla.

Hans Jón Thomsen kannar nærri, hvussu dagurin kann skipast og finnur útav, júst hvør rætti dagurin er.

Støðan viðv. skúlabygninginum:

Tórshavnar kommuna skuldi venda aftur og koma við eini ætlan fyri, hvussu farast skuldi fram viðvíkjandi bygninginum og møguligum umvælingum av ”stóra skúla”. Kommunan hevur ikki gjørt vart við seg. Skúlastýrið er ótolið og vil gjarna hava svar.

Bjørghild Djurhuus og Bogi Andreasen greiða frá, at Skúlin á Fløtum er liðugur á sumri 2020. Tá er ætlanin at byrja upp á Hoyvíkar skúla.

Umstøðurnar kring fótbóltsvøllin:

Hegnið rundan um fótbóltsvøllin bleiv tikið niður, tí tað var í ov ringum standi. Tað bleiv lovað, at hegnið skuldi setast upp aftur, áðrenn skúlin byrjaði aftur eftir summarfrítíðina.

Starvsfólk og leiðsla meta, at støðan er hættislig og okkurt má gerast beinanvegin.

Petur Mittún setir seg í samband við Tórshavnar kommunu og fær nærri kunning um málið.

Lærarastovan og skrivstovuhølini:

Lærarastovan og skrivstovuhølið er ov ótíðarhóskandi og alt ov lítið.

Leiðslan hevur arbeitt við eini loysn, hvussu ein fyribilsloysn kann gerast fyri at loysa hølistørvin. Leiðslan greiðir frá at tilber at flyta lærarastovuna inn í fundarhølið og so víðka skrivstovuhølini inn á núverandi lærarastovu.

Peningaspurningurin verður umrøddur. Kommunustýrislimur spyr, um skúlin hevur peningin til hetta. Leiðslan metir, at kommunan má bera tær útreiðslurnar uttanum raksturin hjá Hoyvíkar skúla.

Skúlastýrið verður kunnað um, at ein teldupostur er sendur til Sigurð Vang og Katrina Ellingsgaard á Tórshavnar kommunu um uppskotið.

Ferðsluviðurskifti vestan fyri skúlan:

Ferðsluviðurskiftini á Kirkjustræti/Karlamagnusarbreyt er hættislig. Eingi ljós eru, og møguleikarnir at seta børnini av eru ikki nøktandi.

Neyðugt er við gonguteigum, ljósum og møguleika fyri at seta børnini av, soleiðis at tey ikki eru í vanda í ferðsluni.

Jeanette Blaasvær og Malan Mikkelsen venda sær til Tórshavnar kommunu hesum viðvíkjandi.

Samskifti við foreldraumboðini í flokkunum:

Foreldraumboðini í skúlastýrinum ynskja tættari samskifti við foreldraumboðini í flokkunum, soleiðis at foreldraumboðini verða nærri knýtt at skúlanum.

Ein fundur skal skipast, soleiðis at forledraumboðini kunnu koma til orðanna. Jeanette Blaasvær kallar inn til fundin við foreldraumboðini, tá hon hevur fingið boð frá leiðsluni, hvørji eru vald sum foreldraumboð í ymsu flokkunum.

Samskifti við starvsfólkini í Námsfrøðiliga ráðnum:

Foreldraumboðini í skúlastýrinum ynskja tættari samskifti við starvsfólkini í Hoyvíkar skúla.

Avgjørt var, at foreldraumboðini í skúlastýrinum vóru við á einum fundi í námsfrøðiliga ráðnum.

Skúlagarðurin:

Kommunustýrislimur spyr, hvussu er við raðfestinum í skúlagarðinum, og hvussu tað gongur at fáa okkurt gjørt í skúlagarðinum.

Leiðslan greiðir frá, at skúlin fekk eina klintripyramidu beint áðrenn summarfrítíðina og at onnur smávegis ting eru gjørd. Eisini hevur summarhjálpin hjá Tórshavnar kommunu fríðka um garðin í summarfrítíðini.

Fundurin lokin kl. 18:00